# Innlating 01.03.23

## 5 Sparkivøllur




Við skúlan er gjørdur ein FIFA-sparkivøllur.

**a** Hvussu long er hornalinjan AB?

Ummálið á miðkringinum er 12,56 m.

Brúka $\pi = 3,14$.

**b** Hvussu stórur er radius í miðkringinum.

Á vøllin er lagt graslíki, sum varð keypt úr Týsklandi.

Kostnaðurin á graslíkinum var 31 € (evrur) fyri hvønn $m^2$. Kursurin á evrum var 745.

**c** Hvussu nógv kostaði graslíkið fyri hvønn $m^2$ í okkara peningi?

**d** Hvussu nógv kostaði graslíkið á allan vøllin?

## 6 Kappingar

Ímóti vári skipar skúlin fyri eini fótbóltskapping ímillum allar 3. flokkarnar í Tórshavn. Eitt lið er úr hvørjum skúla. Kappingin er skipað soleiðis, at hvørt liðið leikar *ein* dyst ímóti hvørjum av hinum liðunum.

Skúlarnir, sum luttaka, eru:

Skúlin við Løgmannabreyt (SL)
Venjingarskúlin (VS)
Eysturskúlin (ES)
Tórshavnar kommunuskúli (TK)
Sankta Frans skúli (SF)
Argja skúli (AS)
Hoyvíkar skúli (HS)

**a** Hvussu nógvir dystir eru í kappingini?